SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Amerikanska álopið var á alljósum degi og tí ikki nakað mistak, men yvirgangur*
*sýriski uttanríkisráðharrin*

# Hava alla tíðina stúrt fyri drápsætlanum

**Fleiri hava bara bíðað eftir, at tær fyrstu drápsætlaninar ímóti Barrack Obama komu undan kavi, tí tað eru ikki allir amerikanarar, sum eru so fegnir um at fáa ein littan forseta**



*Trygdarmenn hjá Secret Service eru alla tíðina hjá Barrack Obama*

*Mynd: AP)*

- Tað, sum øll hava hugsað, men sum eingin hevur torað at tosa um.

Soleiðis hava amerikanskir fjølmiðlar leingi skrivað og tosað um vandan fyri, at onkur kundi finna uppá at forða Barrack Obama at gerast tann fyrsti svarti forsetin í Hvítu Húsunum. Tí kom ntað ikki óvart á fjølmiðlarnar og onnur, tá sam-veldisløgreglan FBI í gjárkvøldið boðaði frá, at myndugleikarnir høvdu avdúkað eina ætlan um at beina fyri Barrack Obama. Sambært tíðindunum, sum tíðindastovan AP bar, skulu tveir nýnazistar, sum løgreglan hevur tikið, hava lagt ætlanir um at beina fyri 102 svørtum amerikanarum, teirra millum Obama.

Jim Cavanaugh hjá samveldisløgregluni í Nashville segði í gjárkvøldið, at tann 20 ára gamli Daniel Cowart úr Tennessee og tann 18 ára gamli Paul Schlesselman úr Arkansas ætlaðu at bróta inn í eina vápnahandil til at fáa fatur á vápnum, sum teir so skuldu brúka til álop á ein skúla, har næmingarnir yvirhøvur eru svartir.

Sambært Jim Cavanaugh ætlaðu teir báðir menninir at skjóta 88 svørt fólk og at hálshøggja 14 afturat. Tølini eru ikki tilvildarlig. 88 verður vanliga brúkt sum ein stytting av „Heil Hitler", og 14 ímyndar „tey fjúrtan orðini" í tí nýnazistiska sáttmálanum, skrivar NTB.

Fyribils eru teir báðir menninir varðhaldsfongslaðir, skuldsettir fyri at hava hótt eitt forsetavalevni, fyri ólógligt vápnahald og fyri at hava lagt ætlanir um at stjala vápn. Álopið á skúlan er ikki nevnt í skuldsetingini, tí løgreglan veit ikki, hvønn skúla talan er um, skrivar AP.

## Á drápsferð

Sambært FBI fingu Daniel Cowart og Paul Schlesselman samband við hvør annan umvegis internetið fyri einum góðum mánaði. Samskiftið teirra millum vísir, at teir hava sera víðgongdar hugsanir um tann hvítamannin, sum eftir teirra tykki stendur oman fyri onnur fólk á jørðini.

Tann 20. oktober fór Daniel Cowart úr Tennessee til Arkansas, har hann skuldi hitta Paul Schlesselman, tí teir skuldu leggja seinastu hond á fyrireikingarnar til álopini, sum so skuldu setast í verk.

Sambært einari lokalari tíðindatænastu skuldu teir fyrst leypa á skúlan. Síðani skuldu teir á eina drápsferð kring USA, og á hesi ferðini skuldu teir millum annað beina fyri Barrack Obama.

- Teir søgdu, at tann seinasti liðurin í ætlan teirra var at beina fyri Barrack Obama. Teir væntaðu ikki, at tað fór at eydnast, men at teir fóru at lata lív, tá teir fóru at royna, sigur Jim Cavanaugh við AP.

Í rættinum skulu teir báðir menninir hava svarað, at teir vóru til reiðar at lata lív undir royndini at myrða Obama.



*Tann 20 ára gamli Daniel Cowart hevði lagt drápsætlanina saman við vinmanninum Paul Schlesselman*

*Mynd: Polfoto*

## Næstan av tilvild

Tað var næstan av tilvild, at drápsætlaninar vórðu avdúkaðar. Tann 22. oktober tók løgreglan í Crockett county í Tennessee Daniel Cowart og Paul Schlesselman, tí tað vísti seg, at teir høvdu óvanliga nógv vápn. Millum annað fann løgreglan eina høglbyrsu, eina riflu og tríggjar skammbyrsur hjá monnunum.

Tey, sum standa fyri valstríðnum hjá Barrack Obama, hava ikki gjørt viðmerkingar til handtøkurnar. Richard Harlow, sum er agentur hjá Secret Service, ið hevur ábyrgdina av trygdini hjá forsetavalevnunum, sigur við AP, at tey meta málið sera álvarssamt, og at tað verður kannað gjølla.

# Norðurkorea hóttir við at leggja Suðurkorea í oyði

Stýrið í Norðurkorea hóttirm við at leggja grannalandið í oyði, um tað ikki leggur á annan politiskan bóigv

- Suðurkoreonsku huppaskjúrtini eiga at hava í huga, at eitt væl fyriskipað fyribyrgingarálop frá okkum fer ikki bara at festa eld í landið, men at leggja tað í oyði, stendur at lesa í einum tíðindaskrivi frá norðurkoreonsku herleiðsluni, sum bleiv almannakunngjørt í morgun.

Sambært tíðindaskrivinum vilja norðurkoreanar vera við, at stjórnin í Suðurkorea spillir norðurkoreonsku leiðsluna út.

- Okkara álop verður við vápnum, sum eru uppaftur sterkari enn kjarnorkuvápn.

Aftan á sigurin kunnu vit stýra einum óheftum og sameindum landi, stendur í tíðindaskrivinum frá norðurkoreanska herinum.

STUTT SAGT

## Trælkvinna vann á statinum

Nigeriska kvinnan Hadijatou Mani hevur vunnið eitt rættarmál ímóti myndugleikunum í heimlandinum. Hon vildi vera við, at nigersku myndugleikarnir høvbdu einki gjørt fyri at forða fyri, at hon bleiv seld sum trælur, tá hon var 12 ára gomul. Hesum fekk hon viðhald í frá dómsvaldinum, sum samstundis gjørdi av, at nigerska ríkið skal rinda kvinnuni endurgjald, skrivar BBC.

Aftan á rættarfundin segði Mani, at hon var sera væl nøgd við úrskurðin. Hinvegin eru eygleiðarar á einum máli um, at dómurin kemur nigersku stjórnini sera illa við. Tingið í Niger samtykti fyri fimm árum síðani at banna trælahaldi, men myndugleikarnir hava lítið gjørt fyri at tryggja, at lógin verður hildin. Tað noyðast teir nú, siga eygleiðararnir.

Sjálv var Mani trælur í 10 ár. Maðurin, sum hevði hana, sum træl, neyðtók hana, og hon fekk eitt barn við honum. Hann fór eisini illa við henni á annan hátt, til hon slapp leys í 2005, tá trælahald bleiv bannað.

## Bretar til Íslands

Fíggjarkreppan í Íslandi og tað lága virðið á íslendsku krónuni hava fingið nógv útlendsk ferðafólk at leita sær til Íslands at keypa, tí har eru nógvar vørur bíligar nú samanborið við prísirnar í øðrum londum.

Í síðstu viku søgdu danskir fjølmiðlar, at nógvir danir fara til Reykjavíkar at keypa í hesum døgum, og nú skrivar Travel Weekly, at nógvir bretar gera tað sama. Sagt verður, at í september vóru 20 prosent fleiri bretsk ferðafólk í Íslandi enn í sama mánaði í fjør, og at gongdin hevur verið tann sama í oktober.

Íslendsk hagtøl vísa, at frá 1. september til hálvan oktober komu næstan 9.000 bretsk ferðafólk til Íslands samanborið við góð 7.300 í sama tíðarskeiði í 2007. Tilsamans komu 58.000 ferðafólk til Íslands millum 1. september og hálvan oktober, og tað er 15 prosent meiri enn í sama tíðarskeiði í fjør, skrivar Morgunblaðið.

Í íslendsku ferðavinnuni eru tey sum vera man fegin um teir nógvu gestirnar, og tey siga seg vóna, at hetta fer at halda fram allan veturin.